


head GAMES

Øllum viðskiftafólki okkara
ynskja vit gleðilig jól
og gott nýggjar

WELLA

tel 313050 Salong TÓTA





*Soleiðis sá bronglaða lýsingin frá Heðin i Mortensen út. Tey, ið hava manipulerað lýsingina eru nú meldað til løgregluna*

# Heimasíða meldað fyri misnýtslu av valtilfari

**Heðin Mortensen, løgtingslimur Sambandsfloksins, hevur meldað heimasíðuna www.spik.dk, ið hevur misbrúkt valtilfar hjá honum**

VAL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Eg veit ikki, hvat man ger við slíkt, men hatta er beinleiðis stuldur av mínum valtilfari, sum eg havi goldið nógvar pengar fyri, sigur Heðin Mortensen, sum ikki gjørdist sørt skakkur, tá hann sá eina lýsing við sær sjálvum, har hann veitrar við Dannebrog og sigur »Farvæl Fullveldi, góðan dagin Danmark, nú skal lánast«.

Talan er um ein lýsingarbannara hjá Heðini Mortensen, sum m. a. er at síggja ovast á breddanum á heimasíðunum hjá Sosialinum og Dimmalætting nú um dagarnar.

Har veitrar hann við føroyskum flaggi, ynskir fullveldinum farvæl og sigur, at »nú skal arbeiðast«.

Tey, ið standa fyri síðuni www.spik.dk hava broytt hesa lýsing og lagt hana á nevndu heimasíðu - sum um at tað er Heðin Mortensen, ið hevur henda margháttliga boðskap.

Heðin Mortensen hevur fyribils meldað teir, ið standa aftan fyri síðuna. Hvat víðari fer at henda, veit hann ikki.

– Fyri meg persónliga hevur hatta nú ikki so stóran týdning, men eg vil fegin vita, hvør tað er, ið hevur gjørt hatta, og hvat endamálið var við hasum, sigur Heðin Mortensen.

Vit hava ikki fingið fatur á teimum, ið standa fyri www.spik.dk. Um teir hava fingið kaldar føtur, ella ikki, vita vit ikki, men í øllum førum var heimasíðan burtur, tá vit royndu at logga á mikumorguin. Tá kom bert fram ein blankur skíggi.


J. Broncksgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo




til Noregs

Farið verður úr Føroyum 4. mars 2004 og vit verða aftur í Føroyum 15. mars 2004. Staðkendur føroyingur er ferðaleiðari. Møguleiki verður eisini fyri at gera útferðir í økinum.

Gist verður í 4 koyggjukamari við wc/bað og sjónvarpi umborð á Norrönu.

Úr Bergen verður farið við bussi til Voss, har gist verður í 8 nætur á HOTEL JARL, sum liggur miðskeiðis í Voss. Síðstu náttina verður gist á Rainbow Hotel Bryggen Orion í Bergen.

Prísur fyri hvønn 6.995,-

**Íroknað prísin er:** 1/2 pensjón á hotellinum, 7 daga skíðpass og bussferð Bergen-Voss, fram og aftur.

Eyka fyri einakamar: ............ 920,- kr.
Eyka fyri 2 koyggjukamar umborð á Norrönu: ...... 560,- kr.
Eyka fyri ferðatrygging: ............ 138,- kr.

Á hotellinum er m.a. biljard, vínstova, pubb, diskotek, svimjihylur og borðtennis. Kømurini hava m.a. minibarr, sjónvarp og telefon. Meir fæst at vita á ***www.jarlvoss.no***

SMYRIL LINE


# Skoyta ikki um allar tryggingar

**Tryggingarfelagið Føroyar vísir kundar frá sær, sum flyta partar av tryggingum yvir í Trygd**

TRYGGING
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

Ein kundi, sum ætlaði at varðveita sína ábyrgdartrygging upp á bilin í Tryggingafelagnum Føroyum, fekk greið boð um, at tað gekk ikki.

- Vit síggja, at tygum eru farin til Trygd við øllum øðrum tryggingum hjá tygum, tí ynskja vit ikki at tryggja akfar tykkara, stendur í svarinum, sum kundin fekk, tá hon ætlaði at tryggja bilin.

Gunnar í Liða, stjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar, váttar, at tað er politikkurin hjá Tryggingarfelagnum.

- Vit skulu hugsa um at fáa vinning burturúr, tí vilja vit ikki bara hava "high-risk" tryggingar eftir, sigur Gunnar í Liða.

Í hesum førinum var talan um eina ábyrgdartrygging til ein bil. Gunnar í Liða heldur, at støðan kanska hevði verið øðrvísi um, bilurin eisini skuldi skrokk-tryggjast.

Grundgevingin í svarinum til kundan er, at kundin hevði skift felag. Grundgevingin er ikki, at talan var um eina trygging, sum kundi geva undirskot.

- Um vit føla at kundar bara ætla at leggja ávísar tryggingar hjá okkum, so siga vit nei, sigur Gunnar í Liða.

- Tankin er tann, at er kundin farin og ætlar bara at hava eina ábyrgdartrygging eftir, tá mugu vit hugsa um okkra forrætning, sigur stjórin í Tryggingarfelagnum.



# Vilja hava gamlar revar aftur á listan

**Bæði Signar á Brúnni og Hans Tausen Olsen standa á listanum hjá tjóðveldisflokkinum í Eysturoynni til løgtingsvalið. Listin verður endaliga avgreiddur í næstu viku**

LØGTINGSVALIÐ 2004
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í Eysturoynni er líkt til, at gamlir revar eru á veg upp aftur í politikk.

Tað er uppstillingarfundurin hjá tjóðveldisflokkinum í Eysturoynni týskvøldið ein ábending um.

Eftir fyrsta uppstillingarfund eru nevniliga bæði Signar á Brúnni og Hans Tausen Olsen á listanum hjá tjóðveldinum.

Hans Tausen Olsen hevur verið uppstillaður mangar ferðir og hann hevur eisini okkurt tíðarskeið verið á Tingi sum varamaður.

Meiri hugvekjandi er tað, at Signar á Brúnni umhugsar at stilla uppaftur.

Hann er annars gamal í garði í politikki.

Han varð fyrstu ferð valdur á ting fyri tjóðveldisflokkin í 1970 og sat til 1980. Tá vann Petur Reinert sessin, men í 1984, varð Signar á Brúnni afturvaldur.

Síðani hevur hann sitið á tingið, men í fjør stillaði hann ikki uppaftur.

Signar á Brúnni varð landsstýrismaður í mentamálum eftir valið í 1998, men máttu stutt eftir leggja frá sær, tí ivi var sáddur um heimildina at játta sjónvarpinum eina peningaupphædd.

Tá tók hann aftur sætið á tingi. Seinni varð hann reinsaði í eini kanning um málið, men til valið í 2002, stillaði hann ikki uppaftur.

## Ikki endalig støða

Signar á Brúnni sigur, at hann hevur ikki endaliga játtað at vera á listanum. Hinvegin hevur hann heldur ikki borið seg undan.

Hann sigur, at hann fer at umghugsa støðuna og at geva endalig boð, áðrenn síðsta hond verður løgd á listan.

Hann sigur, at hann hevur ongantíð fingið so nógvar áheitanir um at stilla upp, sum hesuferð og tí umhugsar hann støðuna.

Men hann vil ikki siga, at hann kennir seg bundnan av teimum nógvu áheitanunum.

– Eg havi verið í politikki í nógv ár, og tað vildi ikki verið ónátúrligt at sagt, at tá ið eg hevði tikið meg aftur, so hevði eg tikið meg aftur.

Hans Tausen Olsen sigur, at hóast hann hevur verið uppstillaður mangar ferðir, er hetta fyrstu ferð, at hann hevur fingið so ítøkiligar áheitanir um at stilla upp og tað tekur hann til eftirtektar.

Annars liggur ongin taktikkur aftanfyri hetta, sigur hann, hóast hann býr á sama plássi sum løgtingsmaðurin Tórbjørn Jacobsen.

– Tórbjørn Jacobsen og eg eri heilt hvør sín og eg haldi ikki, at eg fari at taka atkvøður frá honum. Heldur kundi tað verið, at eg og Signar fóru at taka atkvøður frá hvørjum øðrum, heldur Hans Tausen Olsen.

Hann hevur so ikki fingið varhugan av, at Tórbjørn Jacobsen hevur tikið hetta sum eina forðing.

## Kapping er sunn

Hallur Ellingsgaard, formaður í Eysturoyar Tjóðveldisfelag sigur, at listin verður ikki gjørdur fyri at draga ávís valevni framm ella fyri at leggja ávísum valevnum fótonglar í vegin.

– Tað ræður um at fáa so sterkan lista sum gjørligt fyri at draga so nógvar atkvøður til flokkin sum gjørligt og tí mugu øll valevni tola at fáa kapping, tí kapping ímillum valevnini er góð fyri listan.

Tí vónar og væntar hann eisini at fáa eindaligt játtilisi frá Signari á Brúnni.

Tað ljóðari annars, at Tórbjørn Jacobsen hevur tikið tað rættiliga illa upp

Men hetta afturvísir formaðurin í Eysturoyar Tjóðveldisfelag.

– Tað var ein góður og siðiligur uppstillingrfundur og eg legði ikki merki til nakran illvilja frá Tórbirni Jacobsen, sigur Hallur Ellingsgaard.

Onnur valevni á listanum hjá tjóðveldisflokkinum í Eysturoy eru Olaf í Garði á Eiði, Anfinn Olsen í Søldafirði, Jòn Tyril í Gøtu, Andrea Eldevig í Fuglafirði og Vilmund Jacobsen á Nesi.



*Signar á Brúnni umhugsar nú at stilla uppaftur og fyribils er hann á listanum hjá tjóðveldisflokkinum í Eysturoy*



*–Eg vænti ikki, at eg og Tórbjørn Jacobsen fara at taka atkvøður frá hvørjum øðrum, sigur Hans Tausen Olsen, sum nú fer at stilla uppaftur til løgtingsvalið*




MANNFÓLKAKVØLD

**Eisini vit mannfólk hava tørv fyri onkuntíð at verða fyri okkum sjálvar.**

At hava eina friðarliga macho-løtu og sita við vinum yvir einum væltappaðum... - og tosa um damur, Løgtingsvalið, Manchester United og hvat so skilamenn annars práta um.





**Fríggjakvøldið** verður eitt **"men only"** kvøld har fittar barrgentur mixa góð tilboð og **Dansigenturnar** hava framførslu **Kl 23.00**. Og so tá menn eru komnir í Restorff stemning fara teir undir karaoke og ýla við Vargum og Trøllum.

YERTSHÚSIÐ
Restorffs
HAR ORDILIGIR MENN HITTAST

Sosialurin 341800






Henda áttanda og seinasta bókin í røðini viðger bráða endan, sum føroyska virksemið í Grønlandi fekk.

Seinast í sekstiárunum var so kalt og so nógvur ísur í Grønlandi, at lítið var at fáa. Flestu skipini funnu sær aðrar leiðir, og útróðrarmenninir góvust at fara til Grønlands um summarið. Við hesum fór ein serlig vinna í søguna.

Um sama mundið fóru føroyingar undir nýggjar vinnur í Grønlandi. Fyrst varð farið at fiska laks við gørnum og síðan at trola eftir rækjum. Hetta virksemið eydnaðist og kastaði væl av sær, meðan vit enn høvdu rættindi undir Grønlandi. Tá ið Grønland fór upp í Felagsmarknaðin, broyttust okkara møguleikar, og nú vóru rættindi ikki longur eitt mál, ið kundi avgerast millum ríkispartarnar. Longu í 1970 varð umhugsað at steingja støðina í Føroyingahavnini, men hon andi kortini heilt til 1989, tá ið landskassin ikki longur vildi gjalda.

Hetta var formligi endin á einum sera týdningarmiklum skeiði í føroyskari vinnulívs- og samfelagssøgu.

**Jógvan Arge**

299,-

SANSIR 355 355